*Bretar vilja einki siga:*

# Fullkomin tøgn um oljukeldu við Føroyar

*Helst hava bretar funnið keldu við lættari olju nærhendis føroyska markinum*

Tíðindini hertýri um at manningin á Smyrli sáð brennandi olju og gassloga frá einum bretskum boripalli bert 14 fjórðingar frá føroyska markinum hava fingið bløð í Skotlandi at gera nógv burtur úr hesum málinum.

Sambært eini grein í blaðnum "Press and Journal" so stavar login á bretska boripallinum "Ocean Alliance" frá olju og gassi í undirgrundini.

Blaðið vísir til eina frágreiðing frá eini fyritøku, sum kallast "Offshore Industry Liaison Committee", har seinasta oljufinningin verður umrødd. Har stendur, at møgliga hevur BP funnið eitt slag av serliga lættari olju.

Men frá høvuðsskrivstovuni hjá British Petroleum fæst einki at vita. Har vilja teir ongar viðmerkingar gera til tað manningin á Smyrli sá, tá skipið sigldi framvið boripallinum fyri nøkrum vikum síðani.

Blaðmaðurin á Press and Journal, Jeremy Cresswell, sum burturav tekur sær av orkuspurningum, skrivar í greinini, at hesar seinastu uppdagingarnar hjá BP nærhendis føroyska markinum saman við øðrum oljukeldum, sum longu eru funnar vestan fyri Hetland, eru prógv um, at tað á hesum leiðum í Norðuratlantshavi finnast stórar olju og gasskeldur.







Blaðið leggur afturat, at um somu tíð, sum hetta hendur, so eru føroyingar sera ørkymlaðir av nýggju støðu breta til markið millum londini.

Sosialurin hevur annars fingið upplýst, at tað fer mangt áhugavert fram á júst umrødda boripalli "Ocean Alliance", sum helst ikki skal fram í dagsins ljós. Har er rættiliga nógv virksemi og bendir tað á, at bretar her veruliga hava funnið eina stóra olju- og gasskeldu.

Kelda okkara vil vera við, at uppdagingin er so mikið áhugaverd, at BP nú er í ferð við at leggja eina víðari og miðvísa kanning til rættis í hesum økinum, har oljupallar annars ongantíð áður hava verið.

Tað áhugaverda við hesi nýggjastu uppdagingini er tann, at hon er bert 40 kilometrar frá tí oljukeldu, sum amerikanska oljufelagið "Amereda Hess" fann fyrr í ár. Tað, sum tó er vert at býta merki í her, er at bretski boripallurin er heilt úti á djúpum vanti, millum 500 og 700 metrar, meðan amerikanski boripallurin arbeiðir inni á landgrunninum. Hetta er sostatt fyrstu ferð at borað er eftir olju og gassi á djúpum vatni - og hevur tað eisini givið úrslit.

jan

Gevið bornunum HJÁLM!



Børn duga ikki so væl at taka hendurnar fyri seg, detta tey á súklu.

VERJIÐ HOVDIÐ!

HØVUÐSVINNINGUR:

Olympus μ (mju:)-1 fototól




Tann litla kempan (63x117 mm), sum kann alt – eisini taka myndir A4 støddi so nær sum 35 cm, frá

SMS FOTO & VIDEO

HØVUÐSVINNINGUR:

Piano 1. elektronisk skrivimaskina



v/ øllum hugsandi snildum

frá

Partafelagið Petersen & Guttesen

HØVUÐSVINNINGUR:

Harris Quadro 24

- tað nýggjasta nýggja dartið við møguleika fyri at fáa 4 ferðir rakta talið – um ein vil, frá




P/F THOMAS DAM

HØVUÐSVINNINGUR:

3.000 krónur

frítt at keypa fyri í



fk KEYPSAMTØKAN